Eysturkommuna

# NEVNDARFUNDUR

## Býráðið

| | |
|---|---|
| **Dagfesting:** | 22.06.2023 kl. 17:00 |
| **Málnr.:** | |
| Nevndarlimir: | Per Martin Gregersen<br>Katrin Kjartansdóttir<br>Magnus Skoralíð<br>Marjun Andreasardóttir<br>Rúni Justinussen<br>Marita Klein Joensen<br>Petur Súni Jacobsen<br>Hjalti Dalheim<br>Hanna Jensen |
| Varalimir: | |
| Ikki møtt: | Hanna Jensen |
| Nevndarskrivari: | |


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Mál til viðgerðar:** | | | |
| 42/23 | 23/00282-2 | Umsókn um prinsipielt byggiloyvi á matr. nr. 187a í Norðragøtu | 3 |
| 43/23 | 23/00173-2 | Umsókn um stuðul til rakstur - Losjan Glotti 2023 | 5 |
| 44/23 | 23/00194-4 | Umsókn um stuðul til Blásastovu 2023 - Gøtu Fornminnisfelag | 7 |
| 45/23 | 23/00269-1 | Umsókn um rakstrarstuðul - Bátasavnið | 8 |
| 46/23 | 22/00347-6 | 28/22 Samtykt Byggi - og býarskipanarnevnd, 22.09.2022 Serstøk byggisamtykt fyri sethúsaøki í Fløtugerði í Leirvík | 9 |
| 47/23 | 23/00245-1 | Nýtt graslíki til vøllin Uppi á Brekkum í Leirvík | 12 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 48/23 | 23/00259-3 | Umsókn um uppíbygging av kvisti á matr. nr. 200 LV | 14 |
| 49/23 | 23/00280-1 | Marknaðarumskipan av matriklum 37, 66, 18, 265 og 141 í Syðrugøtu | 15 |
| 50/23 | 23/00288-2 | Umsókn um at keypa afturat á suðursíðuni á matr. nr. 141 í Syðrugøtu | 16 |
| | | | |

**Mál til viðgerðar:**

## 42/23 Umsókn um prinsipielt byggiloyvi á matr. nr. 187a í Norðragøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 14.06.2023 | 12/23 | 23/00282-2 |
| 2 Fíggjarnevnd | 19.06.2023 | 40/23 | 23/00282-2 |
| 3 Býráðið | 22.06.2023 | 42/23 | 23/00282-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur móttikið umsókn um prinsipielt byggiloyvi tann 31. mai 2023.<br><br>Talan er um ein vinnubygning á umleið 2600 fermetrar á matr. nr 187a í havnalagnum í Norðragøtu. Ætlanin er í fyrsta umfari at byggja vinnubygningin ið kann virka umleið 10.000 tons um árið, og væntandi fer hetta at økjast komandi 5-10 árini upp til 25.000 tons, tí verður søkt um at fáa alt lendi sum víst á tekning. Sí skjøl í málinum.<br><br>Eysturkommuna hevur ikki praktisera at geva prinsipielt byggiloyvi, tí mælir umsitingin til at geva eina váttan uppá tilsøgn til økið á matr. nr. 187a í havnalagnum í Norðragøtu, svarandi til umleið 7.000 fermetrar í er galdandi í eitt ár. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til, at geva tilsøgn uppá 7.000 fermetrar á matr. nr. 187a í havnalagnum í Norðragøtu, og at tilsøgnin er galdandi í eitt ár. |

**Vinnunevndin 14. juni 2023**
Vinnunevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Fíggjarnevnd 19. juni 2023**
Fíggjarnevndin mælir tl at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini

**Býráðið 22. juni 2023**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini og fíggjarnevndini.

Eysturkommuna

## 43/23 Umsókn um stuðul til rakstur - Losjan Glotti 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 18.04.2023 | 28/23 | 23/00173-2 |
| 2 Mentanarnevndin | 13.06.2023 | 46/23 | 23/00173-2 |
| 3 Fíggjarnevnd | 19.06.2023 | 44/23 | 23/00173-2 |
| 4 Býráðið | 22.06.2023 | 43/23 | 23/00173-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Losjan Glotti søkir um stuðul til rakstur og viðlíkahald. Sí útgreining í viðfestu umsókn.<br>Søkt verður um kr. 220.000,-<br>Ískoyti 31.05.2023:<br>Trupult hevur verið at fingið málið betur upplýst. Tí metir umsitingin, at bert vanligi rakstrarstuðulin verður latin. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Á fíggjarætlanini fyri 2023 eru kr. 350.000,- settar av á rakstrarkonto 522 – "Stuðul til mentan". |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til at stuðul verður latin á kr. 40.000,- (av 518 – Ymisk mentanartiltøk) |

### Mentanarnevndin 18. apríl 2023
Nevndin mælir til at stuðul ikki verður latin eftir hesi umsókn, men at málið verður tikið upp til nýggja viðgerð.

### Mentanarnevndin 13. juni 2023
Nevndin mælir til at veita vanligan mentanarstuðul á kr 40.000,- og peningurin verður tikin av rakstrarkonto 518 – Ymisk mentanartiltøk. Viðvíkjandi innihaldi av umsokníni, má samskiftast meiri millum partarnar um, í hvønn mun kommunan skal vera partur av viðlíkahaldi.

### Fíggjarnevnd 19. juni 2023
Mæla til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini.

**Býráðið 22. juni 2023**
Einmælt samtykt at taka undir vkið tilmælinum hjá mentanarnevndini  og fíggjarnevndini

## 44/23 Umsókn um stuðul til Blásastovu 2023 - Gøtu Fornminnisfelag

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 13.06.2023 | 47/23 | 23/00194-4 |
| 2 Fíggjarnevnd | 19.06.2023 | 45/23 | 23/00194-4 |
| 3 Býráðið | 22.06.2023 | 44/23 | 23/00194-4 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Gøtu fornminnisfelag søkir um árliga stuðulin til rakstur. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Á fíggjarætlanini fyri 2023 eru kr. 150.000,00 settar av til endamálið (52850 – Blásastova) |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til at stuðul verður latin. |

**Mentanarnevndin 13. juni 2023**
Nevndin mælir til at gjalda rakstrarstuðul á kr. 150.000,- til Gøtu Fornminnisfelag.

**Fíggjarnevnd 19. juni 2023**
Mæla til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini.

**Býráðið 22. juni 2023**
Efinmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini.

## 45/23 Umsókn um rakstrarstuðul - Bátasavnið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 13.06.2023 | 48/23 | 23/00269-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 19.06.2023 | 46/23 | 23/00269-1 |
| 3 Býráðið | 22.06.2023 | 45/23 | 23/00269-1 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Bátasavnið í Leirvík søkir um árliga rakstrarstuðulin. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Á fíggjarætlanini fyri 2023 eru kr. 170.000,00 settar av til endamálið (52812 – Bátasavnið) |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at stuðul verður latin. |

**Mentanarnevndin 13. juni 2023**
Nevndin mælir til at gjalda rakstrarstuðul á kr. 170.000,- til bátasavnið og heita á at roknskapur o.a. verður latið inn.

**Fíggjarnevnd 19. juni 2023**
Mæla til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini.

**Býráðið 22. juni 2023**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini.

## 46/23 28/22 Samtykt Byggi - og býarskipanarnevnd, 22.09.2022 Serstøk byggisamtykt fyri sethúsaøki í Fløtugerði í Leirvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 20.10.2022 | 31/22 | 22/00347-6 |
| 2 Býráðið | 27.10.2022 | 50/22 | 22/00347-6 |
| 3 Byggi - og býarskipanarnevnd | 25.10.2022 | 33/22 | 22/00347-6 |
| 4 Byggi - og býarskipanarnevnd | 15.06.2023 | 17/23 | 22/00347-6 |
| 5 Býráðið | 22.06.2023 | 46/23 | 22/00347-6 |

**Málslýsing:**

Serstøk byggisamtykt er gjørd fyri útstykkingin í Fløtugerði í Leirvík. Útstykkingin liggur í einum B2 økið. Umsitingin hevur arbeitt við at gera eina serstaka byggisamtykt, ið hóskar til útstykkingina.
Í stuttum, so inniheldur serstaka byggisamtyktin hæddarviðurskifti, frástøðu til mark (byggilinjur) v.m. Víst verður til skjøl í málinum.

**Ískoyti:**
Serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri nýggju útstykkingina í Fløtugerði í Leirvík, sí skjøl í málinum.

**Ískoyti:**
Punkt 4.2 í serstøku byggisamtyktini er broytt til soljóðandi:

- Á hvørjum grundøki kann byggjast eitt sethús, sum eisini kann hava eina minni íbúð.

Punkt 4.3 Mest loyvdu hæddir, er broytt til soljóðandi:

- Hús omanfyri vegin við einari hædd og lofti, skal hallið á takhæddini ikki vera meira enn 45 stig og hæddin 8,25 m frá planeringshæddini og upp til húsamønina, sí skjøl í málinum.

**Ískoyti 15.06.2023:**
Eysturkommuna hevur móttikið broytingaruppskot dagfest 30. des. 2022, fyri serstøku byggisamtyktina í Fløtugerði í Leirvík. Sí skjal í málinum.

Umsitingin hevur viðgjørt broytingaruppskotið í mun til hæddir, kotur og hall á tekju.

Í broytingaruppskotinum verða gólvhæddirnar á stykkinum 25-26-27-28 hækkaðar frá kotu frá 10.60 til 11.10 ein hæddarmunur uppá 0.5 m og 1,10 m frá veg kotuni, hetta ger at innkoyringarnar til stykkini verður ov brattar, tað sama er galdandi fyri stykkini 33-34-35-36, har hæddarmunurin frá vegnum verður 1.55 m.
Á stykkinum 29-30-31-32 verður gólvi í miðhæddini hækka við 0.5 m.

| |
|---|
| Í broytingaruppskotinum verður eisini víst til at lækka hæddina í húsinum við 0.5 m frá mønini á stykkinum 25-26-27-28-29-30-31-32, tað vil siga at mest loyvda hæddin á húsinum verður 7.25 m í mun til 8.25 m.<br><br>Við at lækka mest loyvdu hæddina upp til møn við 0.5 m, umframt at hækka gólv kotuna ger at húsini minka við 1 m, hetta kann koma at ávirka hvørji hús fólk ynskja at byggja t.d. ber ikki til at byggja eini Norðseturhús, tí halli á tekjunum verður ov lág, umframt at tað kann gerast trupult at yvirhalda hæddirnar. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til at samtykkja serstøku byggisamtykt fyri økið í Fløtugerði í Leirvík<br><br>Ískoyti 15.06.2023:<br>Umsitingin mælir frá, at samtykkja broytingaruppskotið og at halda fast í verandi byggisamtykt fyri Fløtugerð í Leirvík, sum áður er samtykt í býráðnum. |

**<u>Byggi - og býarskipanarnevnd 22. september 2022</u>**
Málið tikið av skrá

**<u>Byggi - og býarskipanarnevnd 20. oktober 2022</u>**
Málið tikið av skrá

**<u>Byggi - og býarskipanarnevnd 25. oktober 2022</u>**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við umsitngini, við hesi viðmerking:

Punkt 4.3 Niðanfyri vegin
Hús niðanfyri veg kunnu byggjast við einari hædd, yvir vegkotu og kjallara niðanfyri vegkotu. Hesi kunnu ikki byggjast við høgari mønureising. samb. Kortskjali 2.

**<u>Býráðið 27. oktober 2022</u>**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá Byggi - býarskipanarnevndini

**Byggi - og býarskipanarnevnd 15. juni 2023**
Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini dagfest 15. juni 2023.

**Býráðið 22. juni 2023**
Einmælt samtyt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini

## 47/23 Nýtt graslíki til vøllin Uppi á Brekkum í Leirvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 15.05.2023 | 43/23 | 23/00245-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 22.05.2023 | 36/23 | 23/00245-1 |
| 3 Býráðið | 25.05.2023 | 32/23 | 23/00245-1 |
| 4 Fíggjarnevnd | 19.06.2023 | 47/23 | 23/00245-1 |
| 5 Býráðið | 22.06.2023 | 47/23 | 23/00245-1 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Tilboð er umbiðið til nýtt graslíki til vøllin í Leirvík. Verandi vøllur, ið er frá 2012, er slitin og tørvur er á at skifta hann.<br>Sí hjálagda tilboð.<br><br>**Ískoyti 16/6-2023**<br>Á býráðsfundi tann 25/5-23 bleiv samtykt at taka av tilboðnum frá IDE. Samlaði kostnaðurin av arbeiðinum verður uml. 4,2 mió. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Peningur er ikki settur av til endamálið og støða má tí takast til um arbeiðið skal gerast og hvar peningur skal finnast. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at veita eykajáttan á 4,2 mió. |

### Mentanarnevndin 15. mai 2023

Hana Jensen og Katrin Kjartansdóttir mæla til at vøllurin í Leirvík verður skiftur sambært hjáliggjandi tilboði.
Hjalti Dalheim tekur støðu á býráðsfundinum.

### Fíggjarnevnd 22. mai 2023

Per Martin Gregersen og Magnus Skoralíð mæla til at taka undir við tilmælinum hjá meirlutanum í mentanarnevndini.

Hjalti Dalheim tekur støðu á býráðsfundinum

**<u>Býráðið 25. mai 2023</u>**

Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá meirlutanum í mentanarnevndini og fíggjarnevndini

**Atkvøður fyri:**
Per Martin Gregersen, Katrin Kjartansdóttir, Magnus Skoralíð, Marjun Andreasardóttir, Rúni Justinussen, Marita Klein Joensen, Petur Súni Jacobsen, Hanna Jensen

**Atkvøður ímóti:**
Hjalti Dalheim við tí viðmerking at so stórar íløgur eiga at ikki at koma mitt í einum fíggjarárið, men eiga at verða við í fíggjarætlanini.

**<u>Fíggjarnevnd 19. juni 2023</u>**
Mæla til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**<u>Fíggjarnevnd 19. juni 2023</u>**
Mæla til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**<u>Býráðið 22. juni 2023</u>**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini

## 48/23 Umsókn um uppíbygging av kvisti á matr. nr. 200 LV

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðið | 22.06.2023 | 48/23 | 23/00259-3 |
| 2 Byggi - og býarskipanarnevnd | 22.06.2023 | 18/23 | 23/00259-3 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur móttikið umsókn um at byggja kvist og altan á matr. nr. 200 í Leirvík.<br><br>Altanin er at byggja í mark móti koyribreytini. Sambært skjal 1A í BK17 stk. 3, kann altanin ikki byggjast nærri koyribreytini enn 1,00 m.<br><br>Útveggur sum verður bjálvaður, eigur at yvirhalda kravið til minstu hitabjálving, sambært BK17.<br><br>Fleiri av eldri húsunum á Bakka í Leirvík hava hækka húsini, so henda umbygging hóskar til verandi bygging í økinum, og her er ikki talan um at lyfta alla síðuna upp, men at gera ein kvist.<br><br>Umsitingin mælir til at geva byggiloyvi, treyta av, at altanin ikki verður gjørd og at útveggurin verður bjálvaður sambært krøvunum í BK17. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 22. juni 2023**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undur við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 22. juni 2023**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini

## 49/23 Marknaðarumskipan av matriklum 37, 66, 18, 265 og 141 í Syðrugøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðið | 22.06.2023 | 49/23 | 23/00280-1 |
| 2 Byggi - og býarskipanarnevnd | 22.06.2023 | 19/23 | 23/00280-1 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur fingið áheitan frá eigarum av matrikul 18 og 66 í Syðrugøtu, um at flyta matriklarnar so til ber at gera neyst á hesum matriklinum.<br><br>Umsitingin hevur síðan havt fund við allar eigaranar av matriklinum 18, 66, 265 og 141 um at marknaðarumskipa hesar matriklarnar, og semja er funnin um marknaðarumskipanina av matriklinum, sí skjal í málinum.<br><br>Mælt verður til at marknaðarumskipa matr nr. 18, 66, 265 og 141 í Syðrugøtu. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 22. juni 2023**
Byggi- og býraskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 22. juni 2023**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini

## 50/23 Umsókn um at keypa afturat á suðursíðuni á matr. nr. 141 í Syðrugøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðið | 22.06.2023 | 50/23 | 23/00288-2 |
| 2 Byggi - og býarskipanarnevnd | 22.06.2023 | 20/23 | 23/00288-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur móttikið umsókn um keyp av lendi at leggja afturat matr. nr. 141 í Syðrugøtu.<br><br>Umsøkjarin ynskir at keypa umleið 3 fermetrar av matr. nr. 37, svarandi til 0,5 m at leggja afturat á suðursíðuni á matr. nr. 141 í Syðrugøtu. Sí skjal.<br><br>Mælt verður til at selja umleið 3 fermetrar av matr. nr. 37, at leggja afturat matr. nr. 141 í Syðrugøtu. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til at taka undir við tilmælinum. |

### Byggi - og býarskipanarnevnd 22. juni 2023
Byggi- og býarskipanarnevndin mælir frá at selja.

### Býráðið 22. juni 2023
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini

fundurin lokin kl. 18.30

---

Per Martin Gregersen

---

Katrin Kjartansdóttir

---

Magnus Skoralíð

---

Marjun Andreasardóttir

---

Rúni Justinussen

---

Marita Klein Joensen

---

Petur Súni Jacobsen

---

Hjalti Dalheim

---

Hanna Jensen